**Skjal D1**

**From:** Hallur Markná
**Sent:** 30. november 2019 15:24
**To:** Aksel Vilhelmson Johannesen <akselj@logting.fo>; Bill Justinussen <billj@logting.fo>; Jákup Mikkelsen <jakupm@logting.fo>; Kristin Michelsen <kristinm@logting.fo>; Kristina Háfoss <KristinaH@logting.fo>; Magnus Rasmussen <magnusr@logting.fo>; Ruth Vang <ruthv@logting.fo>
**Subject:** Yvirlit yvir lærlingar frá Yrkisdeplinum

Góðu nevndarlimir,

Viðfest er yvirlit frá Yrkisdeplinum yvir lærlingar.
Talan er um tvey ørk í einum excel-skjali, eitt fyri heimkommunu og eitt fyri lestrarkommunu.
Ein samanteljing er fyri hvørja kommunu sær í teiginum uttast til vinstru.

Randi Frederiksberg, leiðari í Yrkisdeplinum, hevur hesar viðmerkingar til tølini:

*" Eg havi nú fingið tølini frá Elektron, men her vísa seg at verða fleiri trupulleikar. Skipanin, sum vit tasta inn í, er ikki ein hagtalsskipan, men tann sum Studni brúkar til at skráseta lestrarstuðul. Yrkisdepilin brúkar skipanina til at rinda lønar- og ferðaendurgjald til fyritøkur eftir. Vit halda okkum skráseta rætt, men tá vit so gera úttrekk vísir tað seg, at skrásetingin ikki altíð er tann besta, tá tað snýr seg um annað brúk so sum hagtøl.*

*Eg havi hugsað, at av tí, at fíggjarnevndin skal brúka tølini til at síggja, hvat skattalættin fer at týða fyri skattainntøkurnar hjá kommununum, so ynskja tit upplýsingar um, hvørjari kommunu lærlingarnir eru búsitandi í og rinda skatt í, heldur enn at vita, í hvørjari kommunu lærlingarnir eru í læru?*

*952 lærlingar eru skipanini beint nú, men tá tað kemur til at vita, hvørjari kommunu lærlingarnir eru búsitandi í, eru fleiri avbjóðingar. Tann størsta er, at beint yvir ¼ av sáttmálunum í skipanini ikki hava ein heimbústað skrásettan, men bert ein lestrarbústað. Tað kann so merkja, at hesir upplýsingarnir mangla, tí lærlingurin ikki hevur uppgivið heimbústað, men tað kann kanska eisini merkja, at lestrarbústaður og heimbústaður er tann sami og tí bert skrásettur einaferð. Alt eftir, hvør tulkingin er, gerst úrslitið ógvuliga ymiskt/mangulfult."*

Vinarliga

Hallur Markná
fíggjarfulltrúi

LØGTINGIÐ

tel. +298 285020
hallurm@logting.fo • logting@logting.fo • www.logting.fo